## Trolarar liggja

Nú tað fer at styttast til jóla, hava summi reiðarí gjørt av at leggja skipini hetta til jóla. Millum teirra, sum liggja, eru partrolararnir Vesturtúgva og Grønanes, sum landaðu 300.000 pund seinasta fríggjadag. Hetta hevur verið eitt gott ár hjá teimum báðum trolarunum. Sørvágstrolararnir Vesturleiki og Vesturskin landaðu 200.000 pund fríggjadagin, men teir fóru aftur til fiskiskap seinnapartin í gjár og koma ætland inn tollaksmessudag.



## Heilivágur oyðileggur kjøt

Inuittaveiðimenn har norðuri í Kanada fýlast á framferðarháttin hjá vísindafólkum, sum kanna djóralívið í tí arktiska økinum. Veiðimenninir vilja vera við, at kanningarhátturin hjá vísindafólkunum órógvar ísbjarnir, hval og roysning, og at vísindafólkini geva djórunum doyvandi heilivág, sum ger, at kjøt og tvøst eru ikki egnað sum mannaføði. Veiðimenninir hava tí biðið kanadisku myndugleikarnar steðga fleiri vísindaligum kanningum. Doyvandi heilivágur ger, at djórini kunnu ikki etast.

## Tunlarnir økja um arbeiðsbyrðuna hjá politinum

**Politiið hevur nógv meira at gera um vikuskiftini, eftir at undirsjóvartunlarnir eru komnir. - Tað er sum á Ólavsøku hvørt vikuskiftið, sigur vakthavandi**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Av politistøðini verður sagt, at nú tunlarnir binda stóran part av landinum saman, er arbeiðsbyrðan munandi økt.

- Hvørt vikuskiftið er sum Ólavsøku. Fólk úr øllum landinum valfarta til Havnar og aðrastaðni at ballast, og hetta gevur nógv eyka arbeiði. Tað er sum um, at tey skikka sær pent heima, men úti hjá øðrum leika tey í, sigur vakthavandi.

Og hon reksar nøkur dømi upp frá vikuskiftinum sum fór, har tveir 18 ára gamlir endaðu í brummuni, tí teir ikki dugdu sær hógv. Um teir tríggir, sum fóru spillnaknir til gongu gjøgnum tunnilin til Klaksvíkar, og um ein triðja, sum legði seg at sova við Hoydalsvegin, tí hann fekk ongan fart heim aftur.

# Naknir menn í Norðoyartunlinum

**Sunnumorgunin komu fólk fram á tríggjar spillnaknar mans, sum høvdu sett sær fyri at ganga gjøgnum Norðoyartunnilin til Klaksvíkar**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Um áttatíðina sunnumorgunin ringdi ein kona á politistøðina, tí hon hevði sæð tríggjar spillnaknar mans til gongu mitt inni í Norðoyartunlinum.

Vakthavandi á politistøðini greiðir frá, at menninir vóru ísakaldir, tí miðalhitin inni í tunlinum er altíð umleið 5 hitastig. Teir tríggir høvdu verið á veg úr Havn í hýruvogni, men høvdu síðani biðið um at verða settir av við tunnilsmunnan, tí teir vildu ganga síðsta teinin til Klaksvíkar. Ein fjórði maður, sum var við teimum, bar klæðini hjá øllum. Eftir øllum at døma høvdu teir veddað um at ganga gjøgnum tunnilin. Løgreglan í Klaksvík varð send eftir monnunum, sum síðani vórðu koyrdir til hús.

Søgan sigur onki um, hvør vann veddingina - men konan, sum kom fram á teir, er kanska eitt gott boð.



*Teir tríggir naknu menninir høvdu eftir øllum at døma vedda um at ganga nakin gjøgnum tunnilin. Kanska konan sum meldaði teir kann siga okkum hvør hevði uppiborið at vinna?*

# Enn eitt ballingarvikuskifti fór framvið

**Tveir átjan ára gamlir sum leikaðu í uttan fyri Glitnir skiltu ikki boðskapin frá løgregluni, og vórðu settir í brummuna at sissast í leygarnáttina**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Enn eitt vikuskifti við jólafrokostum fór rumblandi framvið. Hetta eyðkennir sjálvandi eisini arbeiðið hjá løgregluni, sum varð boðsend til eitt sindur av hvørjum. Tá vakthavandi kom til arbeiðis leygarmorgunin, svóvu tríggir mans í kjallaranum. Tann eini hevði fingið somikið væl upp í høvdið, at hann kundi hvørki "gå eller stå", sum vakthavandi málbar seg. Maðurin hevði gjørt eitt sindur um seg í miðbýnum, og varð noktaður atgongd til eitt skonkistað. Tá hann ikki orkaði at stríðast longur, legði hann seg at sova uttanfyri. Men fólk hildu ikki, at tað var ráðiligt at lata mannin liggja, so hann varð tikin við á støðina, har hann svav rúsin av sær.

### Endaði sjálvur í geglinum

Uttanfyri Glitnir var bardagi í umbúnað, tá løgreglan varð boðsend. Tann eini átjan ára gamli drongurin skilti eftir øllum at døma ikki boðskapin og endaði í brummuni. Hetta góðtók vinmaður hansara ikki, og troppaði upp úti í Bronx, har hann kravdi vinmannin útflýggjaðan. Eftir øllum ikki serliga diplomatiskt, tí hann endaði eisini í kjallaranum. Báðir teir 18 ára gomlu, sum vóru úr somu bygd, svóvu øðina av sær á støðini og verða ákærdir fyri brot á politiviðtøkuna.

### Mamman ringdi til politiið

Leygarnáttina var eisini ein maður í 20unum tikin fyri rúsdrekkakoyring í Vesturbýnum. Hann blásti í ballónina, sum vísti eina promillu. Hann missir helst kortið. Eisini var ein tilburður av húsaófriði í Vesturbýnum, har ein ungur drongur millum annað hevði knúst eitt spegl. Støðan var somikið álvarslig, at mamman ringdi eftir løgregluni at koma út at sissa drongin.

Um áttatíðina sunnumorgunin var politiið boðsent niðan í Statoil-støðina á Hoydalsvegnum, tí har lá ein fullur maður væl ballaður og svav úti í kuldanum. Maðurin, sum hevði verið í býnum í Havn, varð fingin á føtur aftur, og fór at finna sær ein bil heim aftur.

### Full kona

Eisini sunnunáttina vóru bardagar uttanfyri onkur skonkistøð. Ein kvinna hevði drukkið seg so fulla uppi á Hotell Føroyum, at hon varð send á Landssjúkrahúsið. Í Klaksvík kom ein maður so illa fyri uttan fyri Barokk, at hann breyt beinið, og ein var tikin fyri rúsdrekkakoyring í Havn.